## Løgmansfrúan fer niður í hálva tíð

Jórun Johannesen, f. Bærentsen, er kona Kaj Leo Johannesen. Her í samrøðu við Kringvarpið úti í gongini í Løgtinginum, í nýggja leiklutinum sum løgmansfrúa. - At Kaj Leo nú verður løgmaður kemur sjálvandi eisini at ávirka okkum har heima. Eg eri nokkso nervøs, men vóni sjálvandi tað besta, segði hon við Sosialin. Hon og Kaj Leo eiga tríggjar synir, 8, 7 og 2 ára gamlir, og Jórun hevur akkurát fingið játtað at fara niður í hálva tíð úr starvinum hjá Føroya Lívstrygging.



# Fólkaflokkurin valt síni

**Tað endaði, sum Sosialurin alla tíðina hevur spátt, við at nýggju fólkini hjá Fólkaflokkinum í landsstýrinum gjørdust Jørgen Niclasen, Jacob Vestergaard og Annika Olsen**

POLITIKKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*
*myndir: Jens Kristian Vang*

Telvingarnar gjørdust drúgvar, og tingmanning og nývaldu landsstýrisfólkini pástóðu alla tíðina, at alt var opið og at har vóru nógv nøvn at velja ímillum.

Um so hevur verið er ikki hjá teimum uttanfyri standandi at siga, men tað er ein sannroynd, at tngingarnar tilsamans tóku 11 tímar. Hetta er sjálvandi leingi sæð í mun til teir 15 minutt-irnar, Sambandsflokkurin brúkti, men hinvegin lítið í mun til ta tíð, sum Javnaðarflokkurin brúkar.

Hann er so hin seinasti flokkurin, sum skal finna trý landsstýrisfólk at manna nýggja ABC-landsstýrið.

Ymsu miðlarnir í Miðlahúsinum – Sosialurin, Portalurin og Rás2 – hava frá fyrsta degi sagt teirra boð upp á nýggj landsstýrisfólk hjá teimum trimum flokkunum, og nú tveir av trimum flokkum hava valt síni umboð kann bert staðfestast, at miðlarnir í Miðlahúsinum fingu púra rætt í teimum báðum førunum.

Við tí atliti, man altíð noyðist at taka, tá arbeitt verður við einari dead-line, verður Javnaðarflokkurin neyvan liðugur at tinga seg fram til tey trý nøvnini, sum skulu finnast til teir tríggjar landsstýrissessirnir, sum flokkurin eigur, so er tað í førinum Javnaðarflokkurin verri og verri at gita um nøvn.

Tað tóktist frá byrjan av verða rættiliga upplagt, at Jóannes Eidesgaard skuldi gerast fíggjarmálaráðharri, Hans Pauli Strøm helt fram, meðan Helena Dam á Neystabø flutti niðan í Mentamálaráðið. Men nú er støðan meiri ógreið.



*Sum fyrsti miðil, kundi Rás2 beint undan tingfundinum í morgun avdúka nøvnini á nýggju landsstýrisfólkunum hjá Fólkaflokkinum. Her gera Rás2 og Kringvarpið samrøðu við formannin í Fólkaflokkinum, Jørgen Niclasen*

### Torskild telving

Í staðin fyri at málið gjørdist greiðari og greiðari so hvørt tíðin og tingingarnar gingu, tykist sum bara alt fleiri nøvn koma á banan í Javnaðarflokkinum.

Skjótt varð gitt, at Hans Pauli Strøm kanska ikki hevði so stóran áhuga í at halda fram í landsstýrissessinum, so kom Eyðgunn Samuelsen á banan sum møguligur fíggjarmálaráðharri í staðin fyri Jóannes Eidesgaard. Síðani ljóðaði, at John Johannsen vildi hava ein landsstýrissess.

Eisini hevur Axel Johannesen verið nevndur sum eitt møguligt landsstýrisevni, hóast hann ikki er limur í tingbólkinum sum so, og nú upp undir setanina av landsstýrisfólkum er eisini Katrin Dahl Jacobsen nevnd.

Í samrøðu við Rás2 eftir tingfundin í morgun segði John Johannesen, at tingbólkurin av øllum alvi royndi at sannføra formannin, Jóannes Eidesgaard, um at fara út í fíggjarmálaráðið, og at nógv var tengt at, um hetta eydnaðist.

Eydnaðist hetta, tóktust hini bæði landsstýrisfólkini greið, hóast John Johannesen ikki vildi seta navn á. Velur Jóannes Eidesgaard hinvegin at fara aftur í tingið sum vanligur tingmaður, verður støðan eitt sindur ógreiðari, skiltist á øllum brøgdum.

### Tíðin rennur

Men undir øllum umstøðum skal eitt úrslit fyriliggja innan stutta tíð, tí gjørt er av, at nýggi løgmaðurin, Kaj Leo Johannesen, á samkomu klokkan 16 í dag skal handa nýggju landsstýrisfólkunum setanarbræv.

- So nú hava vit bara nakrar fáar tímar til at gera okkum liðug við hesa telvingina, segði John Johannesen.

Hann segði tað ikki beinleiðis, men tað skiltist millum linjurnar, at fór Jóannes Eidesgaard út í fíggjarmálaráðið, so slepti John Johannesen ikki sessinum sum formaður Javnaðarfloksins á tingi.

Velur Jóannes Eidesgaard hinvegin at fara í tingið, gerst hann vælsaktans automatiskt eisini formaður Javnaðarfloksins á tingi, og



*Jacob Vestergaard var í eina tíð fiskimálaráðharri, eftir at Jørgen Niclasen varð kroystur at leggja frá sær. Nú setur hann seg aftur í sama sess*